# 18. Flaggdagsrenningin

**Eingin flaggdagur uttan flaggdagsrenning. Tað hevur verið lagið í nógv ár, og soleiðis verður eisini í 2004**

FLAGGDAGSRENNING
*tíðindaskriv*

Eins og undanfarin ár fer Bragdið aftur í ár at skipa fyri renning á Flaggdegnum. Byrjað verður við Gamla Apotek kl. 16.00, og er tað beint eftir hugnaliga flaggdagshaldið á Vaglinum í Havn. Barnarenningin veður runnin fyrst og beint eftir hetta renna tey vaksnu.

Kappingin er fyri børn og vaksin. Gjørt verður vart við, at øll — skjót og minni skjót, ung og eldri — eru vælkomin. Vaksin renna 7,02 km. og børn, fødd í 1991 - 1997, renna umleið 1,8 km.

Umframt at vera ein kapping fyri einstaklingar er Flaggdagsrenningin eisini ein kapping ímillum virkir, stovnar o.t., nevnd firmakapping. Eisini er hetta fyrsta Grand Prix kappingin í árinum fyri tey vaksnu.

Firmakappingin er skipað á tann hátt, at virkini v.m. kunnu tekna 3-5 vaksnar luttakarar á hvørjum liði, ið so kappast ímóti hvørjum øðrum. Fleiri lið kunnu luttaka frá hvørjum virki. Menn og kvinnur skulu luttaka á hvør sínum liði. Bert tríggjar tær bestu tíðirnar á hvørjum liði telja við í kappingini.

Dreingir - føðiár frá og við 1991-1997, renna 1,8 km.

Gentur - føðiár frá og við 1991-1997, renna 1,8 km.

Kvinnur - føðiár frá og við1959-1990, renna 7,02 km

Menn - føðiár frá og við 1959-1990, renna 7,02 km

Veteranar kvinnur - føðiár til og við 1958, renna 7,02 km

Veteranar menn - føðiár til og við 1958, renna 7,02 km

Eftir at komið er á mál fáa allir luttakararnir frukt og Poptop. Stuðlað hesum hava ávikavist P/F Poul Hansen og MBM.

Vinnandi lið og einstaklingar fáa steyp til ognar. Harumframt verða heiðursmerkir latin til nr. 1, 2 og 3. Høvuðsstuðul til Flaggdagsrenningina er P/F Føroya Shell, sum eisini letur steyp og heiðursmerki. Aðrir stuðlar eru Føroya Sparikassi, MBM og Trygd.

### "Jubilæum"

Hetta er 18. Flaggdagsrenning og tey sum luttaka fyri 10. ella 15. ferð í hesi kapping, fáa heiðursbræv.

### Tilmelding

Síðsta freist at melda til einstaklingakappingina er fríggjakvøldið tann 23.04. kl. 17. Áhugað kunnu tekna seg umvegis heimasíðuna hjá FÍF: http://www.athletics.fo

Fyrireikararnir siga, at tað verður ikki møguleiki at melda seg á staðnum.

Tey, ið ætla at luttaka í Grand Prix kappingini, mugu verða, ella gerast limir í einum av feløgunum, Bragdið, Treystið, Roysnið ella Frælsið. Hetta kann gerast í sambandi við tilmelding til sjálva renningina.

Eisini verður mint á, at startnummur v.m. skulu heintast í ÍSF húsinum.

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum byrjar renningina

Renningin byrjar við, at landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, sigur nøkur orð, letur startskotið ganga og rennur síðani við hópinum.

# Gullið endaði aftur í Havn

**Seinna Stórkappingin 2004 var sunnudagin 14. mars í ítróttarhøllini í Runavík. Kappingin hendan dagin var fyri pinkur og gentur. Kvinnuliðini frá 6. mars og eitt gestalið frá Greve vóru eisini við til framsýningina, so henda dagin fingu áskoðarirnir krás fyri eyga**



*Talan var um eina framúrskarandi gestaframsýning frá donsku meistarunum úr Greve*
*Mynd: Maria Olsen*

FIMLEIKUR
*tíðindaskriv*

Umstøðurnar fyri kappingina vóru eins góðar sum til kappingina 6. mars. Aftur hesa ferð hevði kappingarnevndin gjørt av at nýta pallampur, so at íðkarirnir vóru í miðdeplinum. Til hesa framsýningina vóru fleiri lampur nýttar, og uppstillingin var eisini eitt sindur øðrvísi. Tað tók drúgva tíð at fáa lampurnar innstillaðar, og í einum enda kundi ljósið verið eitt sindur betur, men tað darvaði kortini ikki framførðslunum. Pallampurnar skapa ein serstakan stemning og eina øðrvísi heldur vakra mynd av fimleikarunum og framførðslunum. Tann spenningur og fjáltur sum ofta kemur í av áskoðarunum merkist heldur ikki á sama hátt, so eitt er púra vist, at pallampur verða framhaldandi nýttar til Stórkappingarnar.

### Pinkurnar

Kappingin var ímillum 4 feløg, Ljósið, Havnar Fimleikafelag, Flog úr Fuglafirði og Støkk av Glyvrum. Pinkurnar kappaðust við einari fríari seriu. Úrslitið var sera tætt, munurin ímillum 1 og 3 var 0,46 stig.

### Úrslitið

Ljósið bleiv nr. 1 við 17,56 stig. nr. 2 gjørdist Støkk við 17,26 stig nr. 3 gjørdis Havnar Fimleikafelag við 17,1 og nr. 4 gjørdist Flog við 15,76

Ljósið fekk steyp til ognar sum Føroya Fimleikasamband gav.

Var tað ein fragd fyri eyga at síggja kappingina 6. mars hjá kvinnunum, so var hendan kappingin fyri gentur minst líkað góð, um ikki betur, og var tað fløvandi at síggja okkara framúrskarandi lið.

Gentuliðini vóru eisini frá somu feløgum sum hjá pinkunum.

Genturnar kappaðust í tveimum serium, og úrslitið var eisini sera tætt. Munurin ímillum 1 og 3 var 0,14 stig og ímillum nr. 1 og 4. var 1,86 stig. Tað skal eitt ótrúligt hugflog til hjá venjarunum til samansettingina av seriunum, og hesar høvdu eisini lagt stóran dent á smyrsl, glimmur, draktir og amboð, sum eisini gav eina ótrúliga flotta sjón í tí døkka ljósinum.

### Úrslitið

í tí fríu seriuni hjá gentum gjørdist Havnar Fimleikafelag nr. 1 við 17,96 stigum nr. 2 gjørdist Støkk við 17,90 stigum, nr. 3 gjørdist Lósið við 17,82 og nr. 4 gjørdist Flog við 16,1 stigum

Amboðið hjá gentunum var bóltar. Tað var sera spennandi at síggja, hvussu tær arbeiddu framman fyri pallampunum, sum tær ongantíð høvdu roynt áður. Men tað tyktist ikki darva framførðsluni, tó hendi tað, at onkur bóltur endaði uttan fyri markið, og takast mátti til eyka bólt, okkurt kast miseydnaðist eisini.

Úrslitið fyri amboð: Nr. 1 gjørdist Havnar Fimleikafelag við 18,06 stigum, nr 2. gjørdist Støkk við 17,33 nr. 3 gjørdist Ljósið við 17,30 stigum og nr. 4 gjørdist Flog við 15,89 stigum.

Samanlagt og føroyameistari gjørdist Havnar Fimleikafelag við 36,02 stigum, nr. 2 gjørdist Støkk við 35,23 stigum, nr 3 gjørdist Ljósið við 35,12 stigum og nr. 4 gjørdist Flog við 31,99 stigum.

Sostatt verður tað Gentuliðið hjá Havnar Fimleikafelag sum verður við sum gestur til DM í Greve 25. apríl.

Gestaliðið frá Greve framførdi - eins og okkara kvinnulið - eisini 2 seriur, og tær blivu dømdar á sama hátt sum okkara kvinnur. Í tí fríu seriuni sást beinanvegin at tær ikki høvdu somu framførslu sum okkara lið. Tær hava luttikið í VM, so tær eru farnar yvir til tann estetiska fimleikin, ið líkist meiri ballet við klassiskum tónleiki, og hesin fimleikur er heilt øðrvísi enn vit eru von við. Tað var eysæð at ikki allir áskoðararnir dámdu teirra framførslu, men tað eru sjálvandi ymsar meiningar um tað.

Hóast liðið frá Greve er farið at framføra estetiskan fimleik, so hava ikki øll feløgini í Danmark gjørt tað sama, vónandi hava kvinnurnar hjá Havnar Fimleikafelag tí onkran annan at kappast ímóti eisini. Um fimleikur í Føroyum skal fylgja við gongdini í útheiminum, mugu vit eisini fara tann vegin.

Úrslitið hjá Greve í tí fríu seriuni var 18,06 stig.

Amboðserian við vimplum var góð, sjálvt um okkurt miseydnaðist. Tað er sera ringt at fáa eina framførslu við vimplum at sampakka, vimplarnir eru oftast sera langir, og tað tykist so óruddiligt.
Úrslitið í amboðseriuni bleiv 17,79 stig, og samanlagt fekk Greve 35,85 stig.

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 10 | 9 - 0 - 1 | 604 | 434 | 170 | 29 |
| 2 VB | 9 | 9 - 0 - 0 | 583 | 438 | 145 | 26 |
| 3 VÍF | 9 | 5 - 0 - 4 | 541 | 451 | 90 | 19 |
| 4 Neistin | 9 | 5 - 0 - 4 | 527 | 487 | 40 | 18 |
| 5 StÍF | 10 | 2 - 0 - 8 | 505 | 593 | -88 | 9 |
| 6 Søljan | 10 | 2 - 0 - 8 | 416 | 548 | -132 | 6 |
| 7 Kyndil | 9 | 1 - 0 - 8 | 344 | 569 | -225 | 3 |

Søljan-Neistin 20-24 (10-8):

# Neistin heldur stílinum

**Enn einaferð hevði Neistin stórar trupulleikar av Søljuni, men enn einaferð eydnaðist kortini at fáa fult**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Neistin sýndi aftur hóskvøldið, at hóast møguleikin fyri heiðursmerkjum er lítil, so eru tær framvegis ov sterkar hjá teimum trimm niðastu liðunum.

Hóskvøldið avgreiddu tær útsetta dystin á Giljanesi, og tó at Neistin sum vant hevði stórar trupulleikar av vágakvinnunum, so megnaðu tær aftur at draga fult.

Alt tóktist ganga so nøkunlunda á leið hjá gestunum fyrstu longu løtuna av dystinum, men undan steðginum tók Søljan veruligt dik á seg. 5-7 varð broytt til 10-8, og so var spenningur av álvara í dystinum. Hesin helt sær eisini til nakað inn í seinna hálvleik, men við 13-13 fór at standa fast hjá gestunum. Nicoleta Radu varð nú hildin burtur frá fatinum, og uttan hana at seta álitið á, megnaðu vertirnir ikki at fylgja við bláu mótstøðuni, sum spakuliga økti leiðsluna.

Eina løtu megnaði Søljan tó at skapa spenning í aftur, men tá tær misnýttu brotskast við støðuni, 19-21, og Neistin síðani skoraði, var leyst og liðugt. Heimaliðið visti nú, at møguleikin fyri einum óvæntaðum úrsliti var fokin, og so kundi Neistin enn einaferð taka tvey stig við sær eftir dyst móti einum av niðaru liðunum.

### Dysturin í tølum

**Søljan-Neistin 20-24 (10-8)**
**Málskjúttar**
**Søljan:** Nicoleta Radu 7(3), Heidi Maria Akselsen 5, Hertha Simonsen 3, Irdi Mikkelsen 2, Arnleyg Haraldsen 1, Fía Selma Nielsen 1, Heidi Haraldsen 1
**Neistin:** Simona Dziugyte 9(4), Lina Andriulyte 5, Lív Sørensen 5(2), Marjun Tróndarson 4, Anna Clementsen 1
**Brotskøst:** Søljan 5, Neistin 10
**Útvísingar:** Søljan 5, Neistin 3
**Diskvalifikatión:** Søljan 1 (3X2 minuttir)
**Dómarar úr H71:** Jákup Símun Simonsen & Høgni M. Joensen.



